Bátastevnan 2002:

# Stór undirtøka



*132 bátar vóru við í stóru bátastevnuni, sum var í Vestmanna 25. mai*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Undirhúsið í Vestmanna skipaði 25. mei saman við kapp-róðrarfelagnum hjá VÍF fyri stórari bátastevnu. Undirtøkan var sera góð og eru fyrireikararnir væl nøgdir við tiltakið**

BÁTASTEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

Stóra bátastevnan, sum var 25. mei, fekk stóra undirtøku. Heilir 132 bátar luttóku á stevnuni, harav 54 lógu náttina yvir í Vestmanna. Á keiøkinum høvdu fyrireikararnir skipað fyri, at samarittarnir hjá Reyða Krossi gingu vakt og ansaðu eftir teimum bátunum, ið lógu við kei.

Um kvøldið varð skipað fyri dansi í ítróttarhøllini, har Country bólkurin í Klaksvík spældi. Frá fyrireikarunum frætta vit, at góð 700 fólk vóru til dansin.

Inn komu tilsamans 90.000 krónur, men tá eru útreiðslur og annað ikki roknað frá.



*Áhugin fyri bátastevnuni var sera stórur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*




LONDON

SUMMER GROUP PRICES

30. juni - 8. juli
4. august - 12. august

**HOTEL REGENCY - 8 nætur**

Vaksin **kr. 7.595,-**
Børn **kr. 4.595,-**

Prísurin byggir á, at 2 -12 ára gomul børn búgva á kamari saman við tveimum vaksnum.

**Við í prísinum:**
- 8 nætur á dubultkamari við enskum buffet-morgunmati
- Bussur frá Stansted til hotellið í London (og aftur)
- Rundferð í London (við bussi og ferðaleiðara) uml. 2 1/2 tíma
- Tower of London (við bussi og ferðaleiðara) hálvan dag
- Mademe Tussauds Wax Museum (við bussi og ferðaleiðara) hálvan dag
- Imperial War Museum (við bussi og ferðaleiðara) hálvan dag
- Lion King sangleikur eftir Elton John og Tim Rice (við bussi)
- Mama Mia sangleikur um ABBA (við bussi aftur og fram og døgurða aftaná framførsluna)
- Ferðaavgjald

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo




# Flestu skilja, at Norðskálatunnilin er stongdur




*Eysturoyingar, sum búgva eystarumegin Norðskálatunnilin og skulu til Havnar og heimaftur, noyðast nú at koyra tilsamans 50 km longri hvønn dagin. Alternativið er gamla Terna, sum siglir millum Skálafjørðin og Havnina*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Herfyri reisti Sosialurin spurningin, um Norðskálatunnilin ikki er ein bølamyrk deyðsfella. Stutt eftir segði sýslumaðurin í Eysturoy, Kristian M. Joensen, at viðurskiftini í tunnlinum vóru lívshættislig.**
**Nú er tunnilin stongdur fyri vanligari bilaferðslu, og farleiðin hjá eysturoyingum, sum búgva eystanfyri tunnilin, er einar 25 km. longri.**
**– Men tað er eingin »telefonstormur« her hjá okkum, sigur landsverkfrøðingurin, Oyvind Brimnes.**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Í Sosialinum herfyri reistu vit spurningin, hví Norðskálatunnilin er so vátur og myrkur. Navngivin lesari, Jóannes S. Hansen, spurdi, um hetta hevði nakað við SEV-boringarnar beint omanfyri at gera, men hesum avvísti Dánjal Syderbø hjá landsverkfrøðinginum. Hann vísti á, at orsøkin til nógvu vætuna er, at flestu pláturnar undir loftinum, sum leiða vatnið út í vegjagaran, eru tiknar niður og verða skiftar út. Tí rennur vatnið niður á breytina og ger, at tunnilin verður so vátur og myrkur at koyra ígjøgnum.

Í greinini reistu vit eisini spurningin, um Norðskálatunnilin er ein bølamyrk deyðsfella.

## Hættisligur

Og ikki mundi hesin spurningur vera av leið, tí einar 14 dagar seinni sigur sýslumaðurin í Eysturoy, Kristian M. Joensen, at Norðskálatunnlin er hættisligur at koyra ígjøgnum.

Hann heitti tí á landsverkfrøðingin um at syrgja at fáa »lívshættisligu ferðsluviðurskiftini í Norðskálatunnlinum í lagi«.

– Landsverkfrøðingurin hevur lovað at gera okkurt, so ferðsluviðurskiftini fáast í lagi og gerast trygg, nú arbeitt verður í tunlinum. Vit fara at fylgja við, hvussu stendur til, og verður ferðslan ikki avgreidd á tryggan hátt, mugu vit umhugsa at seta tiltøk í verk. Ljóssignalini skulu virka eftir ætlan, og uppmerkingin við skeltum skal eisini vera í lagi, segði sýslumaðurin.

Ringastu ferðslutrupulleikarnir í tunnlinum standast av, at landsverkfrøðingurin er í ferð við at spreingja vendipláss út í tunnilsveggin, og meðan tað verður gjørt, er bara koyrandi eftir aðrari breytini.

## Um Eiðisskarð

Men landsverkfrøðingurin hevur nú tikið avleiðingarnar av vánaligu umstøðunum, sum verið hava í tunnlinum seinastu tíðina og hevur boðað frá, at tunnilin bert er opin fyri tungari ferðslu, lastbilum, trailarum og bussum, frá kl. 7 á morgni til 22 á kvøldi. Tunnilin er stongdur fyri aðrari bilaferðslu og víst verður til vegin um Eiðisskarð. Eftir kl. 22 og til kl. 7 er tunnilin stongdur fyri allari ferðslu.

Landsverkfrøðingurin hevur boðað frá, at tunnilin helst verður stongdur í eina til tvær vikur – ella so leingi koyrandi bara er eftir tí eini breytini í einum parti av tunnlinum.

Kristian M. Joensen, sýslumaður, sigur, at tað var landsverkfrøðingurin, sum tók avgerðina um at steingja tunnilin fyri vanligari bilaferðslu.

Fólk grenja, tí vegurin um Eiðisskarð er er einar 25 km. longri, men tey flestu, sum vita, hvussu umstøðurnar seinastu dagarnar vóru í tunnlinum, munnu skilja, at hetta var tað einasta rætta. Tó vilja tað altíð vera nøkur, sum ikki skilja ella vilja skilja, at neyðugt var hjá landsverkfrøðinginum at taka avleiðingarnar av vánaligu umstøðunum og steingja tunnilin.

## Eitt njótilsi

Tað er summar og eingin hálka ella vindur er at hugsa um, og setir tú tær ein hálvan tíma eyka av til túrin, kann leiðin um Eiðisskarð saktans vera eitt njótilsi ein góðveðursdag.

Tey, sum regluliga koyra í Norðskálatunnlinum, kunnu bert vóna, at arbeiði, sum nú verður gjørt, gongur væl, og at viðurskiftini í tunnlinum verða munandi betri, tá ið hann letur uppaftur.

Landsverkfrøðingurin, Oyvind Brimnes, vísir á, at ferðandi úr Eysturoy hava tvær farleiðir, tá ið tey skulu til Havnar og heimaftur, tí umframt leiðina um Eiðisskarð, siglir gamla Ternan eisini millum Skálafjørðin og Havnina.

– Eg haldi, at flestu skilja okkara avgerð, og her hevur eingin »telefonstormur« verið, síðan vit stongdu Norðskálatunnilin fyri vanligari bilaferðslu, sigur landsverkfrøðingurin.

# Norðskálatunnilin liðugur um eini tvey ár

**Landsverkfrøðingurin, Oyvind Brimnes, sigur, at Norðskálatunnilin helst verður opin aftur fyri vanligari ferðslu um eina viku ella so.**
**– Vit mettu, at tunnilin fór at vera stongdur í tvær vikur, men helst verður arbeiði, sum ger, at hann nú er stongdur, liðugt fyri ta tíð, sigur hann.**



*Norðskálatunnilin fær ljós, ventilatión, antennur, neyðtelefonir og eldsløkkjarar*
*– Alt, sum gerast skal, fer helst at fevna um eini tvey ár aftrat ella so, sigur Oyvind Brimnes, landsverkfrøðingur*

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Fólk, sum dagliga ferðast gjøgnum Norðskálatunnilin, skulu ikki vænta, at hesin verður turrur og góður, tá ið hann verður latin uppaftur fyri vanligari ferðslu um eina viku ella so, tí pláturnar, sum halda vætuni burtur av koyribreytini, koma ikki uppundir aftur enn.

– Tað, sum nú verður gjørt, er spreingiarbeiði og grótarbeiði í samband við tey trý møtiplássini, sum gerast skulu, sigur Oyvind Brimnes.

Hann vísir á, at møtiplássini í Norðskálatunnlinum verða størri enn tey, sum eru í eitt nú Signarbøartunnlinum.

– Men hetta er bara ein lítil partur av øllum tí, sum vit eru í holt við, nú tunnilin verður dagførdur.

Oyvind sigur, at møtiplássini eru ein partur av trygdini, soleiðis at tey tungu akførini kunnu venda og koyra útaftur, haðani tey komu inn, um t.d. ein vanlukka hendir, og eldur kemur í.

Spurdur, um hetta eru trygdarkrøv, sum skulu lúkast, sigur landsverkfrøðingurin, at í prinsippinum eru eingi slík krøv her heima.

– Men vit hava lagt okkum eftir at fylgja norsku reglunum um tunnlar, sigur hann.

## Nógv skal gerast

Oyvind sigur, at tað er altíð torført at máta trygd, men arbeiði, sum landsverkfrøðingurin er í holt við í Norðskálatunnlinum, er rættiliga umfatandi og kemur helst at fevna um eini tvey ár aftrat.

– Vit hava valt at dagføra tunnilin og taka hendur um trygdina, nú loftið kortini verður reinsað fyri leyst grót og vegabreyt og dren skulu setast í stand.

Hann sigur, at alt, sum gerast skal, er rættiliga umfatandi, og pengar eru ikki til alt hetta í ár.

– Eg vænti, tað fer at taka eini tvey ár, áðrenn alt, sum gerast skal, er liðugt, sigur Oyvind Brimnes.

Hann vísir á, at ljós, ventilatión, antennur, neyðtelefonir og eldsløkkjarar skulu setast uppí Norðskálatunnlinum.

– Komandi ár verður vegabreytin gjørd av nýggjum, eins og ljós verða sett upp. Síðan fær tunnilin ventilatión, og trygdarútgerðin verður sett upp, sigur Oyvind.

## Nýggjar plátur

Sum skilst, kunnu fólk rokna við, at Norðskálatunnilin verður vátur og myrkur leingi aftrat, tí pláturnar, sum eru tiknar undan loftinum, skulu ikki uppaftur, og tí fer vatn framvegis at renna niður á koyribreytina.

Landsverkfrøðingurin sigur, at hesar plátur verða skiftar út við aðrar og betri plátur, sum verða sproytaðar við fipraðum betongi.

– Hetta verður ein permanent loysn, sum eitt nú norðmenn nýta til at tryggja loftið í tunlum við. Men hetta arbeiði verður ikki gjørt enn, sigur Oyvind Brimnes.